Havnar Handverkarafelag o.fl.

## VÆLKOMIN

Havnar Handverkarafelag saman við niðanfyri nevndu fakfeløgum bjóða limum sínum trygging í samstarvi við Tryggingarfelagið LÍV.

- Havnar Handverkarafelag
- Vágs Handverkarafelag
- Tvøroyrar Handverkarafelag
- Skála Handverkarafelag
- Grafiska Yrkisfelagið

Avtalan er galdandi fyri virknar limir og skrivstovufólk hjá fakfeløgunum

Innliman er treytað av fullum arbeiðsførleika. **Er limur settur í tillagað starv, skal hetta fráboðast LÍV.**

Tryggingin fellur burtur mánaðin eftir, at tú fyllir 67 ár, um tú ikki longur ert virkin limur ella fer úr starvi.

Verður farið úr skipanini innan eftirlønaraldur, kann framhald av tryggingini avtalast við LÍV.

## SAMLAGSTRYGGING

Tryggingarparturin er skipaður sum samlagstrygging og gevur rætt til útgjald:

- við deyða
- um hjúnafelagi/sambúgvi* doyr
- við ávísum hættisligum sjúkum
- lokaupphædd

***Sambúgvi:**

- búgva saman og hava, vænta ella hava átt barn saman
- **ella** hava búð saman sum í hjúnalagi seinastu 2 árini undan deyðadegnum.

Tryggingarskeiðið er fram til fylta 67. ár.

Eitt møguligt útgjald er skattafrítt.

## TILSKILAN

Við deyða innan fylta 67. ár, verður tryggingarupphæddin útgoldin sambært tilskilan.

Útgoldið verður til "næsta avvarðandi", um ikki onnur skrivlig avtala er gjørd við LÍV.

"Næsti avvarðandi" er í fyrstu atløgu eftirsitandi hjúnafelagi. Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til sambúgva. Er eingin sambúgvi, verður útgoldið til børn. Eru eingi børn verður útgoldið sambært testamenti/arvalógini.

**Ynskist tryggingarupphæddin útgoldin til onnur enn "næsta avvarðandi" t.d. sambúgva, skal hetta fráboðast LÍV skrivliga.**

Skjalið "Broyting av tilskilan" er at finna á heimasíðuni **www.liv.fo**

**Kundin eigur LÍV**

Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

# TRYGGING

## VIÐ DEYÐA

Útgoldið verður til tann/tey, ið skrásett eru sum tilskilað.

Tryggingin er galdandi bæði í arbeiði og frítíð. Útgoldið verður uttan mun til, um deyðin skyldast sjúku ella vanlukku.

Afturat tryggingarupphæddini við deyða verða kr. 35.000,- útgoldnar til hvørt barni sær undir 21 ár.

Doyr **hjúnafelagi/sambúgvi**, verður hálv tryggingarupphædd útgoldin.
(Ikki galdandi fyri útgjald til børn.)

*Útgoldið skattafrítt í einum*

**Við deyða**

| | | |
|---|---|---|
| Tryggingarupphædd | kr. | 550.000 |
| Til børn u/21 ár | kr. | 35.000 |
| Hjúnafelagi/sambúgvi | kr. | 275.000 |

## ÁVÍSAR HÆTTISLIGAR SJÚKUR

Útgoldið verður, um
- **tú** ella
- **børn undir 18 ár**

verða rakt av "ávísari hættisligari sjúku".

Nærri ásetingar og listin yvir fevndar sjúkur er at finna í tryggingartreytunum, sum liggja á heimasíðuni **www.liv.fo**

*Útgoldið skattafrítt í einum*

**Ávísar hættisligar sjúkur**

| | | |
|---|---|---|
| Limur | kr. | 130.000 |
| Børn u/18 ár | kr. | 130.000 |

## ÓARBEIÐSFØRI

Verður arbeiðsorkan skerd við meira enn 50% fellur tryggingargjaldið burtur aftaná 3 mánaða óarbeiðsføri.

Eftir hetta rindar LÍV tryggingargjaldið so leingi óarbeiðsførið stendur við. Tó í mesta lagi fram til fylta 67 ár.

**Við óarbeiðsføri**

LÍV rindar tryggingargjaldið

# EFTIRLØN

## LOKAUPPHÆDD

Eftir neyvari ásetingum hjá Havnar Handverkarafelag o.fl. verður upphæddin útgoldin í einum, tá tú verður 67 ár.

Fult útgjald krevur í minsta lagi 10 ára limaskap í fakfelagnum. Seinastu 5 árini, fram til útgjald, skulu vera uttan íhald.

*Er ásetingin um áhaldandi 5 ára limaskap, fram til útgjald, ikki uppfylt, kann gjaldast út ein lægri upphædd eftir neyvari ásetingum hjá Havnar Handverkarafelag o.fl. Minsta upphæddin er kr. 50.000*

*Útgoldið skattafrítt í einum.*

**Full lokaupphædd**

| | |
|---|---|
| 2020 | kr. 100.000 |

## KUNDAPORTALUR

Á heimasíðu okkara www.liv.fo finnur tú kundaportalin "**MÍTT LÍV**". Her fært tú m.a. innlit í uppsparing, persónligar tryggingar, samlagstrygging, inngjøld og teknisku uppgerðina.

**Soleiðis ritar tú inn:**
Brúkaranavn er P-talið.
Afturat hesum nýtir tú eitt loyniorð, sum er sent til tín við innliman.

Hevur tú ikki loyniorðið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á LÍV



## RÁÐGEVING

Tú ert vælkomin at seta teg í samband við LÍV, ella ein av niðanfyri nevndu ráðgevum:

Dan Joensen
dan@liv.fo
Tel. 21 19 50

Gunnvør D. Jensen
gunnvor@liv.fo
Tel. 21 14 13

Viviann Petersen
viviann@liv.fo
Tel. 23 11 73

**P/F Tryggingarfelagið LÍV**
Kopargøta 1,
Postboks 206, 110 Tórshavn
Tel. 31 11 11, fax 35 11 10
Teldupostur: liv@liv.fo

**Skrivstovutíðir:**
Mánadag-hósdag: 10.00-16.00
Fríggjadag : 10.00-15.00

**Fyrivarni:** Eru upplýsingar í hesum faldara ikki í tráð við nýggjastu tryggingaravtaluna millum Havnar Handverkarafelag o.fl. og LÍV, eru tað ásetingar í tryggingaravtaluni, sum eru galdandi

01.01.2020/LÍV